TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Anita Vibergsdóttir, Bogi Johannesen, Alvi Mortensen, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen
Bjarni Hammer møtti kl. 19:50

Skrivari: Fróði Mortensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

**Pkt. Tekstur** **Síða**

| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Stroyming av býráðsfundum | 2 |
| 2 | Samanbering av skattainntøkum -jan, feb & mars. 2020 | 3 |
| 3 | Onnur viðgerð -Dagføring av Kommunustyrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu -§32 Tilbúgvingarnevndin | 3 |
| 4 | Mentanarnáttin 2020 | 5 |
| 5 | Ansingargjald tá barnagarðurin er stongdur | 6 |
| 6 | Frítiðarkortið -útbering | 7 |
| 7 | Hvalbiar kommuna -fyrisp. um nýtslu av svimjihylinum til skúlabørn | 7 |
| 8 | Stuðul til bygging av nýggjum kappróðrarneystið til FSR | 9 |

29. april 2020



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.00-A00-17-16**

## 1. Stroyming av býráðsfundum

### Samandráttur

Forkvinnan ynskir málið um stroyming av býráðsfundum á skrá.

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 1. oktober 2018, pkt. 14:**
Málið verður beint fyri býráðið til umrøðu og støðutakan.

Samstundis verður heitt á umsitingina at kanna, hvør útgerð er egnað til endamálið.

**Býráðið, 3. december 2018, pkt. 9:**
Atkvøðugreiðsla um stroyming av býráðsfundum: 6 atkvøður fyri, ein atkvøða ímóti. Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri, Kristin Michelsen atkvøddi ímóti. Málið fallið.

**Kommunustjórin 23. apríl 2020**
Málið at stroyma frá býráðsfundum verður tikið uppaftur, eftir at málið fekk umrøðu í samband við avleiðingarnar av Korona kreppuni, ið avmarkar møguleikarnar at halda almennir býráðsfundir á lógligan hátt við áhoyrarum. Kommunala eftirlitið hevur viðgjørt serstøðuna viðv. koronakreppuni og niðurstøðan er at: Dátueftirlitið hevur tulkað persóns upplýsingar lógina soleiðis, at vanligt krevst samtykki frá øllum kommunustýrislimunum fyri at stroyma kommunustýrisfundir. Í hesum serligu tíðum, har landsstýrið hevur sett í verk nøkur tiltøk fyri at forða smittuspjaðingini av koronasjúkuni, kann tað verða torført at hava almennar kommunustýrisfundir. Kommunala eftirliti hevur sett seg í samband við dátueftirlitið hesum viðvíkjandi, og er niðurstøðan tann at so leingi tilmælini frá landsstýrinum standa við, er tað nokk, at meirilutin í kommunustýrinum samtykkir, at kommunustýrisfundir verða stroymdir. Tað er ikki neyðugt við samtykki frá hvørjum einstøkum kommunustýrislimir fyri at kunna stroyma beinleiðis í hesum tíðum.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Avgerð**

Einmælt samtykt at stroyma verður frá býráðsfundi í korona tíð, og at hetta fær gildi á næsta fundi.

**00.34.00-1-20**

## 2. Samanbering av skattainntøkum -jan, feb & mars. 2020

**Málsfrágreiðing**

**Kommunustjórin 7. apríl 2020.**
Samanbering av skattainntøkum mnd. jan-mars 2020/2019

**Fíggjarnevndin, 22. april 2020, pkt. 1:**
Vegna vantandi viðtøkuføri –Bjarni Hammer og Kristina Roest møtti ikki á fundi, og vara limurin Bogi Johannesen hevði forfall- verður málið beint beinleiðis á býráðsfund.

**Kommunustjórin 23. apríl 2020.**
Samanbering av skattainntøkum mnd. jan-mars 2020/2019

**Avgerð**

Málið var viðgjørt og kunna

**00.01.10-A00-2-17**

## 3. Onnur viðgerð -Dagføring av Kommunustyrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu - §32 Tilbúgvingarnevndin

**Málsfrágreiðing**

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Kommunustjórin 5. januar 2020**
At endurskoða "Kommunustyrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu" §32 1. petti. Tilbúgvingarnevndin hevur 7 limir. -Hetta eisini við atliti til evt. samstarv við Fámjin kommunu um tilbúgving.

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin), 7. februar 2020, pkt. 6:**
Tilmæli um broyting av kommunustýrisskipanini:
Lógarkravt er: at borgarstjórin er føddur formaður, at har er eitt umboð fyri løgregluna, umframt átaksleiðarin.
Harafturat eru tvey umboð fyri Tvøroyar Kommunu, eitt umboð frá Bjargingarfelagnum, eitt umboð frá Hvalbiar Kommunu og eitt umboð frá Fámjins Kommunu.

Tilmælið verður sent til Tvøroyar Kommunu og Hvalbiar Kommunu til viðgerðar.

**Kommunustjórin 14. februar 2020**
Til støðutakan at broyta kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu, samsvarandi tilmælið frá Brunanevndini -treyta av at Fámjins kommuna verður partur av felags tilbúgvingini- soleiðis at nevndin verður manna við:

- Borgarstjórin á Tvøroyri -er føddur formaður (lógarkravt)
- Eitt umboð fyri løgregluna
- Átaksleiðarin
- Tvey umboð fyri Tvøroyar Kommunu -vald av Tvøroyrar býráð
- Eitt umboð frá Bjargingarfelagnum
- Eitt umboð frá Hvalbiar Kommunu
- Eitt umboð frá Fámjins Kommunu.

Tilmælið verður sent til Tvøroyar Kommunu og Hvalbiar Kommunu og Fámjins kommunu til viðgerðar.

**Fíggjarnevndin, 20. februar 2020, pkt. 8:**
Fíggjarnevndi samtykkir einmælt at fyggja tilmælinum hjá Brunanevndini, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið, 26. februar 2020, pkt. 6:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 28. februar 2020**

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Onnur viðgerð av málinum at endurskoða "Kommunustyrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu" §32 1. petti. Tilbúgvingarnevndin hevur 7 limir. -Hetta eisini við atliti til evt. samstarv við Fámjin kommunu um tilbúgving.

**Avgerð**

Einmælt samtykt til aðru viðgerð.

**20.00.00-G01-1-20**

## 4. Mentanarnáttin 2020

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 17.04.2020**
Støða má takast til skipan av Mentanarnáttini 2020.

**Mentanarnevndin, 20. april 2020, pkt. 1:**
Bjarni Nygaard var á fundinum fyri at greiða frá hvørji til tøk eru á skrá, og nær "deadline" er at at avlýsa. Einmælt samtyk er at avlýsa mentanarnáttina í ár orskaða av Korona, og ístaðin skipa fyri mentanar tiltøkum ígjøgnum alt árið.

**Kommunustjórin 22.04.2020**
Støða skal takast til tilmælið frá mentanarnevndini um Mentanarnáttina

**Fíggjarnevndin, 22. april 2020, pkt. 6:**
Vegna vantandi viðtøkuføri –Bjarni Hammer og Kristina Roest møtti ikki á fundi, og vara limurin Bogi Johannesen hevði forfall- verður málið beint beinleiðis á býráðsfund.

**Kommunustjórin 23.04.2020**
Mælt verður til at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini og avlýsa Mentanarnáttina 2020.

**Avgerð**

Einmælt samtykr at fylgja tilmælinum frá mentanarnevndini

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**28.09.44-Ø40-1-20**

## 5. Ansingargjald tá barnagarðurin er stongdur

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 7. apríl 2020.**
Til støðutakan er hvørt Tvøroyrar kommuna skal innheinta ansingargjald, tá barnaansingin er stongd. Støðan er serlig, nú Korona kreppa er um allan heimin, og Løgmaður, Heilsumálaráðið og Landslæknin hevur gjørt reglugerðir, sum viðføra at skúlar og barnaansingin so at siga er stongd.

- Lønarútreiðslurnar fyri Mars 2020, fyri barnagarðin og frítíðarskúlan er: 901.581,29kr írokna frítíðarløn/frítíðarískoyti og arbeiðsmarknaðargjald.
- Ansingargjøld fyri 145 børn fyri 1. mnd. samsvarar við kr. 221.500,-

Verður samtykt, ikki at innheinta ansingargjald kevur hetta samsvarandi eykajáttan.

**Sosiala nevnd, 20. april 2020, pkt. 2:**
Forkv. í Mentanarnevndini og Bogi Johannesen mæla til, at ansingargjaldið fyri apríl, har barnansingin var stongd, vegna korona tilmælið ikki verður uppkravt. Anita Vibergsdóttir tekur støðu á býráðsfundi.

**Kommunustjórin 21. apríl 2020.**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til tilmælið frá meirilutanum í sosialunevnd, um ikki at innheinta ansingargjald, tá barnaansingin er stongd. Verður samtykt, ikki at innheinta ansingargjald kevur hetta samsvarandi eykajáttan.

**Fíggjarnevndin, 22. april 2020, pkt. 5:**
Vegna vantandi viðtøkuføri –Bjarni Hammer og Kristina Roest møtti ikki á fundi, og vara limurin Bogi Johannesen hevði forfall- verður málið beint beinleiðis á býráðsfund.

**Kommunustjórin 23. apríl 2020.**
Mælt verður til at málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Avgerð**

29. april 2020



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt, at onki ansingargjald verður innheinta fyri apríl mánað.

**32.12.00-1-19**

## 6. Frítíðarkortið -útbering

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 23.04.2020.**
Borgarstjórin ynskir at viðgera útberingina av frítíðarkortinum.

### Avgerð

Einmælt samtykt, at frítíðarkortini vera borðin út í apríl og mai mánað.

**82.16.00-P27-1-20**

## 7. Hvalbiar kommuna -fyrisp. um nýtslu av svimjihylinum til skúlabørn

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 3. april 2020**
Fyrisp. er komin til umsitingina frá Hvalbiar kommunu, um loyvið til at leiga svimjihylinum í Tvøroyrar skúla til skúlaári 2020/2021 til næmingarnar í Hvalbiar skúla til skúlasvimjing. -Talan er um 4 tímar pr. viku.
Umsóknin er sent til hoyring hjá skúlastjóranum, Jón Johannesen, og hann upplýsur, at tað er ongin truplulleiki, at Hvalbiar skúli fær tímar í svimjing, í svimjihylinum í Tvøroyrar skúla skúlaárið 2020/2021.

Tvøroyrar kommuna og Hvalbiar kommuna hava havt samstarv um hetta sama fyrr. Men seinastu árini hava skúlabørn í Hvalba koyrt suður til Pálshøll í Vági.

Kommunustjórin mælir til, at samstarvið millum Tvøroyrar kommunu og Hvalbiar kommunu verður tikið uppaftur, og at at ein samstarvsavtala verður gjørd um kostnað, reingerð, flutning og trygd- við serligum atliti til ábyrgdina av svimjingini. -livbjargarar o.a.-

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Mælt verður til at:

- · Hvalbiar skúli fylgir teimum ásetingum, sum skúlaleiðslan í Tvøroyra Skúla ásetur galdandi fyri svimjihylin og kringøkið.
- · Leiðslan í Hvalbiar skúla setur seg í samband við leiðsluna í Tvøroyrar skúla, fyri at tilrættisleggja tíð, tørv og reglugerðir.
- · Hvalbiar skúli setur seg væl inn í reglugerðinar viðv. trygd inna svimjing og svimjuhyljar, og kunnar hetta til lærarar og børn.
- · Tað er skúlaleiðarin í Hvalbiar skúla, sum hevur ábyrgdina av, at teir lærarar sum eru til staðar í svimjuhøllini í Tvøroyrar skúla, tá børnini úr Hvalbiar skúla eru til svimjing lúka krøvini til lívbjarging.
- · Tað skal vera minst 1 vaksin persónar tilstaðar, ið hevur góðkenda lívbjargaraútbúgving innan svimjing til staðar í svimjihøllini fyri hvørt 15 barn í hylinum.

Kostnaðurin fyri skúlasvimjing í kommunum kring landi liggur millum kr. 500,- til 1.000,-/tíma. Tá er talan um størri svimjuhyljar enn tann í Tvøroyrar skúla.

Mælt verður til, at áseta eitt leigugjald á kr. 300,-/tíman, at dekka fyri ljós og hita, svarandi til kr./mnd. 4.800,-. Tá skal Hvalbiar skúli sjálvur útvega fylgjarar og lívbjargarar.

**Mentanarnevndin, 20. april 2020, pkt. 4:**
Einmælt samtykt at ganga umsóknini frá Hvalbiar Kommunu á møti. Tilmælið er at seta gjaldið til kr, 500,-/tíma.

**Kommunustjórin 21. apríl 2020**
Til støðutakan er tilmælið hjá Mentanarnevndini at leiga svimjihylin í Tvøroyrar skúla skúla næmingar í Hvalbiar skúla til skúlasvimjing skúlaári 2020/2021, og at gjaldið verður ásett til kr. 500,-/tíma.

**Fíggjarnevndin, 22. april 2020, pkt. 4:**
Vegna vantandi viðtøkuføri –Bjarni Hammer og Kristina Roest møtti ikki á fundi, og vara limurin Bogi Johannesen hevði forfall- verður málið beint beinleiðis á býráðsfund.

**Kommunustjórin 23. apríl 2020**
Mælt verður til at loyvið verður givið til Hvalbiar Skúla at at brúka svimjihylin á Tvøroyri til skúlabørn komandi skúlaár, samb. tilmælið frá Mentanarnevndini, og ásetingunum frá umsitingini. Mælt verður til at gjaldið fyri tænastuna verður beint í fíggjarnevndini.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Avgerð**

**Uppskot 1.**
Kristin Michelsen mælir til, at henda avtalan verður vikað soleiðis, at borgarar í Hvalbiar kommunu fáa eins atgongd til almenna svimjihylin í skúlanum í Tvøroyrar Skúla og borgarar í Tvøroyrar kommunu.

**Uppskot 2.**
Mentanarnevndini mælir til at skúlabørn í Hvalbiar Skúla fáa loyvið til at at nýta svimjihylin í Tvøroyrar Skúla til skúlasvimjing, og at gjaldið verður sett til kr. 500,-/tíma.

Atkvøtt var uppskotið frá Kristin Michelsen
Fyri var: Kristin Michelsen
Ímóti var: Kristina Roest, Bogi Johannesen og Bogi Johannesen
Atkvøtt blankt: Alvi Mortensen, Anita Vibergsdóttir

Atkvøtt var um uppskotið frá mentanarnevndini: Einmælt samtykt

**02.34.02-G01-14-13**

## 8. Stuðul til bygging av nýggjum kappróðrarneystið til FSR

### Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 14.04.2020**
Til støðutakan er játtanin til stuðul til nýtt kappróðrarneystið til Froðbiar Sóknar Kappróðrarfelag (FSR) á kr. 3,5Mill. fyri ár 2020.

Samb. nevndini í FSR verður kostnaðurin at byggja nýtt kappróðrarneystið uml. kr. 8,0 Mill. Tvøroyrar býráð hevur avsett á fyri fíggjarárið 2019, kr. 500.000,- og fyri fíggjarárið 2020 ávíkavist kr. 3,5 Mill. -Írestandi kr. 3,5 Mill kr, vera ætlandi avsetast fyri fíggjarárið 2021.

Umsitingin hevur sent Kommunala eftirlitinum fyrisp. hvussu slík stuðulsupphædd kann avgreiðast, orsakað av fleiri ógreiðum viðurskiftum, m.a við ognarviðurskiftum, kostnaði, stødd og útsjón á byggningi.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Málsgongdin:**

- Talan er um í alt 6 uppskot til bygging av nyggjum kappróðrarneystið, síðani FSR vendi seg til TVK, at fáa stuðul til býgging av nýggjum neysti.
- Uppskot 1 -er frá ár 2012, har byggjast skal 240m2 á Tanganum fyri kr. 1,5 Mill. (kr. 6.250/m2)
- Uppskot 2 –er frá ár 2012-2013, har byggjast skal á Tanganum, nú við MAP Ark., ið hevur tekna. Støddin er 250m2, kostnaðurin er mettur til kr. 4.5 Mill.
- Uppskot 3 –er frá ár 2014-15, á Tanganum samstarv millum FSR, LOA o.ø. stødd og kostnaður ókent.
- Uppskot 4 –er frá 2018, á Hvítanesi HMP Consult, stødd 360m2, kostnaður kr. 4.4 Mill.
- Uppskot 5. er frá 2019-2020, á Hvítanesi, tillaga/broytt HMP uppskot 4, kostnaður kr. 8 mill. **-Hetta er uppskotið, sum ætlanin pr. apríl 2020 er at byggja.**
- Uppskot 6. er frá 2018, á havnalagnum á Tvøroyri, sjálvboðið uppskot frá Páll Lave, kostnaðurin er ókendur. -partur av miðbýðarætlanini-

Umsitingin ynskir at fáa greiðu á ymiskum spurningum og heimildini, at stuðla einum ítróttarfelag við kr. 8Mill. við einari "ókendari byggiverkætlan" –og ókendum treytum til útgjald o.a.

- Greiða má fáast á hvør annar veitur stuðul um enn nakar ?
- Greiða má fáast á ognarviðurskiftini á gamla neystinum ? Skal FSR framhaldandi vera eigari av hesum, ella er talan um eitt gera býtið?
- Greiða má fáast á ognarviðurskiftini á nýggja neystinum ?
- Greiða má fáast á ognarviðurskiftini á lendinum har bygt verður ? -bygt verður á ogn hjá TVK, sum krevur frámatrikkulering.
- Greiða máa fáast á hvat verður bygt ? - Stødd og útsjónd.
- Greiða máa fáast á býráðsins vilja til útsjónd, kostnað og rakstur ?
- Greiða má fáast á leiklutin hjá TVK undir byggingini og eftir at henda er liðug ? -Skal TVK evt. standa fyri byggingini, ella vera partur av ráðgevingini?
- Greiða má fáast á byggiloyvir, -eru/skulu friðingar myndugleikar geva loyvið at byggja, eins gjørt var á Tanganum? -áheitan er komin frá borgara um gamalt virksemið á økinum.
- Greiða máa fáast á heildar ætlanina á Hvítanesi eftir at ein "stórur" bygningur er ætlaður á økið?
- Greiða má fáast á estetikki, byggilinju, tørv, kringøkið og endaliga kostnaðin?

Mælt verður til at fáa útgreina omanfyri, áðrenn endalig avgerð verður tikin til at útflyggja stuðulin.

**Mentanarnevndin, 20. april 2020, pkt. 9:**

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | |
|---|---|
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Málið var umrøtt og mentanarnevndin mælir til at FSR fær heimlid til at byrja uppá ætlanina at gera økið á Hvítanesi byggibúgvið. Og Mentanarnevndin mælir samstundis til, at uppskotið frá Lasse Jensen dagft. 16.04.2020 verður beint í Vinnu- og Havnanevndini.

**Kommunustjórin 24.04.2020**
Kommunustjórin metur ikki at málið er búgvi og frámælir, at uppskotið verður samtykt, sum hetta liggur í løtuni. Umsitingin metur, at tað eru nógvir ósvaraðir spurningar í málinum, og mælir ístaðin til, at hesir vera viðgjørdir og svaraðir, áðrenn endaligt loyvið verður givið til at byggja nýtt kappróðrar- neyst á Hvítanesi.
Umsitingin ger eisini vart við, at kommunan hevur liggjandi eina heildarætlan fyri økið millum Hvítanes og Bedingina frá 2016, ið BRIM Arkitektar hava gjørt. Tann verkætlanin er hugsa, at henda kann fremjast í stigum, har alt økið verður eitt "maritim" savningarstað. Uppskotið hjá BRIM gongur m.a. uppá, at gamli og søguligi heilsølu bygningurin hjá P/F Poul Hansen verður dagførdur, og blívur miðdepil og savningarstað, sum verandi kappróðrarneyst hjá FSR, eins og træbrúgvin og fiskaplássið verður partur av heildarætlanini, har bátafólk o.o. fáa tænastuveiting.
Umsitingin mælir til, at Tvøroyrar kommuna viðgerð neyvari hvørjir møguleikar eru fyri at betra um umstøðurnar hjá FSR, í trá við omanfyri nevna uppskot frá BRIM, um hetta evt. kann nøkta tørvin hjá FSR ella ikki. At uppskotið frá Teknisku deild dagft. 16.04.2020, har neystið hjá FSR verður verandi eystan fyri Varðan Pelagic, verður enn betri lýst, áðrenn ein endalig avgerð verður tikin.

**Avgerð**

Tilmælið frá meirilutanum, at FSR fær graviloyvi og byggiloyvi til bygging av nýggjum kappróðrarneystið á Hvítanesi, og at stuðulin, sum Tvøroyrar kommunua hevur samtykt fyri fíggarári 2020 verður leysgivin og flutt til FSR, treyta av friðingarmyndugleikarnar geva neyðug loyvir til bygging.
Tilmælið var einmælt samtykt

29. april 2020



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | |
| Fundardagur | 29. april 2020 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin 29.04.2020**

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Anita Vibergsdóttir

Bogi Johannesen

Alvi Mortensen

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen